


# Hjartasuff fra einum ungum sjómanni



Val
RAGNAR MOURITSEN
Miðflokkurin

Tosaði ein dagin við ein ungan sjómann, og spurdi hann, hvat hann helt um fiskivinnuna. Hetta er tað hann skrivaði til mín.

"Sum ungur sjómaður í Føroyum, vil eg ikki siga at man hevur eina bjarta framtíð.

Fólk sum "ikki" liva av fiskivinnuni, hata sjómenn - tí teir fáa handan sokallaða órættvísa skattalættan. Og tey byrja at himla við eygunum, tá ið man fer at tosa um høvusvinnuna hjá okkum, tí tey eru so troytt av, at hoyra hesar forkelaðu sjómennirnar, sum forvinna væl betur enn ein miðal hampa arbeiðsmaður, kæra sína neyð, um at tað er eingin fiskur, og at Per og Pól selja fiskiloyvir sum tey hava fingið fyri einki, fyri milliónir.

Eg vildi meint, at tann sum kom at sita sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum, fór at hugsa um hvat kann gerast fyri at fáa tað at vera áhugavert at fiska aftur, so at vit aftur kunnu fylla skipini við dugnaligum føroyskum fiskimonnum. Føroyingar eru jú kendir fyri at vera dugnaligir fiskimenn. Ti er tað spell, at skipini skullu sigla næstan manntóm, ella við manning, sum ikki dugir sítt fak til fulnar.

Er man ein ungur fiskimaður í dag, so hevur man ongan møguleika at sleppa frammat at keypa eitt skip. Tað einasta sum eg hevði havt møguleika at keypa, er ein gamlan avoldaðan ormetnan træbát, við einari gamlari rustaðari egningarmaskinu, og við einari manning sum var millum 80 ár og skinn deyð.

Og hann hevði eg kunna keypt, tí at loyvi er ov lítið til at koyra á ein størri linubát. Men hesir bátarnir tímir eingin at keypa, tí at teir bera seg ikki. Ætli eg mær at keypa ein lítlan fittan trolbát, so má eg punga út við 20 milliónum, og harav kostar loyvi 7 milliónir. So óansæð um loyvi kostar 7 mill, so má eg út við 13 milliónum bert til hettar eina skipi, og tað kann ein ungur maður ikki klára. So eg haldi ikki at tað eru loyvini sum gera, at ungir menn ikki koma framat.

Men tað sum er tað allar ringasta, er at ungir menn hava søkt um at sleppa at veiða fisk, sum eingin annar roynir eftir, men teir verða skúgvaðir til viks - um teir í heila tiki verða tiknir í betragtning. Eg veit fyri vist, at ein maður eg kenni væl, kom við einum frálíkum hugskoti um nýggjan veiðumøguleika, og hann fekk nei! Grundin var tann, at teir í fiskimálaráðnum meintu at raksturin bleiv ov dýrur.

Tað skuldi sjálvandi verið øvugt; at fiskimálaráðið var so himmalsfegi um, at tað enn vóru ungir menn í Føroyum, sum høvdu ambitiónir. Teir skuldi jú heldur spurt eftir fólki, sum hevur hug og áræði at royna nakað nýtt. Og tað hevði ikki bila petti, um teir hjálptu hesum monnum í gongd, antin við at lata bílig lán, ella við at geva teimun eitt líti oyra at starta upp við, tí hettar kemur øllum samfelagnum til gagns.

Man hevur ikki skipaða frítíð, og forvinnur ikki frægari, enn at man má verða meira enn helvtina av árinum burtur. Og so sigur tað seg sjálvt, at man fer at leita aðrar leiðir, har inntøka og frítíð er betur. Fer man at føra ein línubát, - og tað havi eg roynt, so ger man ikki annað enn at leita eftir fólki. Tað eru nokk tær størstu orsøkirnar, at ungir menn ikki tíma at fara til skips longur.

Og til endans, so meini eg at tað eru ALT ov nógvir línubátar undir Føroyum. Landstýri skuldi skorið ígjøgnum og keypt nakrar av teinum, og skrotta teir, fyri at minka um veiðitrýsti.

Samanumtikið so meini eg, at um ein føroysk fiskivinna, skal halda áfram, so verður man noyddur at fáa fólk at hyggja positivt uppá hesa vinnu, ogikki bara misunna okkum hendan skattalætta. Faa ungdómurin at læra sindur um fiskivinnuna í skúlanum og at man fær skipaði frítíðarviðurskifti."

Hvat kann man siga til hatta, uttan at landið hevur svikið? Her má okkurt gerast, so vit aftur kunnu vera errin av okkara sjomonnum, sum stríðast fyri hvønn stert og enn halda okkara landi uppi.

Eg eri so errin av teimum, og vónandi kann eg gera mítt til, at teir fáa tað, teir hava uppiborið.

Velji Miðflokkin so skil kemur í aftur fiskivinnuna - vinnan sum ger, at tunnlar, ellisheim og alt annað, ið valevni lova í eyst og vest í dag, kann fremjast í verki.

# Eldralóg og fleiri starvsfólk í røktina



Val
KATRIN DAHL JAKOBSEN
Javnaðarflokkurin

Tað er einki yvir at dylja, at okkara eldru eru so púrasta rættarleys, tá tað ræður um umstøður teirra á ellisárum. Vit hava eingi krøv, ongan standard, einki minstamark fyri, hvat er sømiligt at bjóða okkara gomlu. Ongar ásetingar fyri, hvussu leingi tað er rímiligt t.d. at standa á bíðilista til heim, einki sum fortelur, hvussu umstøðurnar skulu vera, um fólk verða búgvandi heima, tíansheldur rættindi til uppvenjing o.a.m.

Tí mugu vit hava eina eldralóg um tilboð og rættindi, soleiðis at tey eldru eru tryggjað, antin tey búgva í sínum egna heimi, ella tey flyta í annað heim á stovni.

Tað er spáað um, at brúk verður fyri fleiri røktarstarvsfólki komandi árini. Men longu nú vita vit, at tað stendur á. Hesi fólkini renna seg um rygg og hava alt ov lítla tíð til at taka sær av trivnaðinum. Tí mugu vit styrkja um starvsfólkapartin, so trivnaðurin hjá báðum pørtum verður betri.

Vit mugu hugsa um mannarættindi og etikk - eisini í eldrapolitikkinum. Summi skriva, at "hetta og hatta skylda vit okkara gomlu"! Eg hugsi ikki, at okkara eldru ynskja at standa í skuld til nakran. Tað er júst tað, sum mangan nívir - hetta, at standa í skuld og kenna seg sum ein byrðu. Tað er óverdugt!

Í einum vælferðarsamfelag eigur eingin at ganga og skylda nøkrum nakað. Vælferð er nakað vit solidariskt bjóða hvør øðrum, nakað vit eru vorðin samd um og eiga at tryggja hvør øðrum, sama hvar á lívsleiðini vit eru stødd. Eitt felags projekt fíggjað úr felagskassanum. Eisini eldraróktin. Tí skilji eg ikki roknistykkið hjá teimum, sum lova størri vælferð, um somu tíð, sum tey lova ovurhonds skattalættar! Hetta hongur ikki saman!

Komið heldur og semjist um rættindini hjá teim eldru komandi valskeið!!

# Vit hava nakað at læra av íslendingum



Val
NITA NÆS
Javnaðarflokkurin

Í greinini 10. jan.Tú hevur rætt Gunnvør Hofgaard! Sigi eg í einum broti: "tankan um, at unga familjan skal hava minst 4 inntøkur fyri at klára ein vanligan dagligdag, sum unga íslendska familjan noyðist."

Orðingin er skeiv. Ein sera skilagóð íslendsk kvinna ringdi til mín, og eg vil hervið biðja um umbering ------ vit skulu ansa eftir mytum sum verða slongdar her og har, og somuleiðis - at vit ikki genralisera. Eg eri kedd um, at eg kom at orða meg á henda hátt, tí eg veit ov lítið um íslendska samfelagið til at siga slíkt.

Samstundis eri eg fegin um, at eg skrivi frammanundan í sama broti:"Vit vita frá íslendsku vinum okkara, at vinnulívið har er sterkt og at íslendingar duga og tora at trúgva uppá m.a. at mentan kann gerast samfelagsvinningur, fær hon rætta grundarlagið at byggja á.

Endamálið við geinastubbanum var, at eg vildi geva Gunnvør Hoffgaard rætti í, at vit eiga at steðga á og spyrja: Hvat slag av útviklingi vilja vit hava í Føroyum. Og tað burdi eg havt gjørt uttan at siga nakað um Ísland - - sum ikki er rætt orðað. Sorry!

# Føroyskt skipasmíð bjargað á stokkinum



Val
RODMUNDUR NIELSEN
valevni Fólkaflokksins á Lista A, sjálvandi!

Føroya løgting eigur at skapa rammur fyri føroyskt skipasmíð soleiðis, at bestu karmar verða skaptir. Vit skulu gera skipanir fyri at varðveita hetta handverkið her á landi. Tað er við stoltleika fyri føroyskt skipasmíð at síggja føroyskt handverk, sum er fyrsta klassa. Um vit bera okkum rætt at, koma vit at kunna útflyta okkara skipahandverk og skapa nógva arbeiðspláss.

Loysnin er, at vit tryggja okkum útlendska arbeiðsmegi. Tørvurin á arbeiðsmegi er størsti trupulleikin fyri vøkstri í hesi vinnu og vit vita at eftirspurningurin eftir skipum í útlandinum er stórur.

# Leivssjóð-ó-moralskt!



Val
NITA NÆS
Javnaðarflokkurin

Eg slapp ikki við í Leivssjóðhópin, tá ið Leivur Hansen í september ringdi og bað meg vera við í sjóðinum. Leivur spurdi meg, um eg skuldi stilla upp fyri Javnaðarflokkin. Eg svaraði, at 'tað skuldi eg kanska'.

Tí slapp eg ikki við.

Leivur sveik allan fjølmiðlaetikk, tá hann í kvøld lovaði einum fjølmiðlaeksperti at føra tjóðveldispropaganda í sending síni í Kringvarpi Føroya.

Hetta eigur at verða átalað!